FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

31. januar 2023
Mál: 23/02093-4
(at tilskila í svari)

Tygara skriv: 52-055/2022

Svar til fyrispurning nr. 52-055/2022 frá Árna Skaale, løgtingsmanni, um, hvussu Føroyabanki royndist í 2022

Spurningar:

1. Hvussu royndist skipanin, tá hugsað verður um fleksibilitet og gagnnýtslu av samlaða talinum av tillutaðum døgum í teimum trimum bólkunum, sum fingu loyvi at veiða á Føroyabanka?
2. Hvørjir bátar, greinað á bólkar, veiddu á Føroyabanka í 2022?
3. Hvussu stórt var veiðivirðið hjá hvørjum einstøkum bólki sær?
4. Hvussu er miðalvirðið pr. veiðudag hjá hvørjum bólki sær?

Svar:

Til spurning 1.
Tíðaravmarkaða serskipanin fyri veiðu eftir botnfiski á Føroyabanka í 2022 bar í sær, at línuskip í bólki 3 og útróðrarbátar 15-110 tons í bólki 4 fingu egnar fiskidagar - átta dagar hvør. Útróðrarbátarnir undir 15 tons í bólki 5 fingu 30 felagsdagar.

Samanlagt vórðu 176 fiskidagar útskrivaðir til línuskip í bólki 3. Av hesum brúktu tey samanlagt 168 fiskidagar. 48 fiskidagar vórðu avhendir millum línuskipini í bólki 3.

Samlaða talið av fiskidøgum, tillutaðir útróðrarbátum 15-110 tons, var 176. Av hesum vórðu 163 dagar brúktir. 56 dagar vórðu avhendir millum bátar í bólki 4.

Útróðrarbátar undir 15 tons høvdu 30 felags fiskidagar á Føroyabanka í 2022. Teir brúktu allar fiskidagarnar.

Til spurning 2, 3 og 4.
Í talvunum 1, 2 og 3 er yvirlit yvir øll fiskifør, ið vóru til fiskiskap á Føroyabanka í 2022. Talvurnar vísa eisini avreiðingarvirðið og miðalvirðið pr. veiðidag.

Viðmerkjast skal, at tølini fyri avreidda nøgd og avreiðingarvirði hjá bólki 3 eru ikki endalig.

Onkur avreiðing hjá frystilínuskipi er ikki seld enn, og tí er nøgd og avreiðingavirði heldur ikki skrásett.

TALVA 1 : Veiða á Føroyabanka 2022 – línuskip í bólki 3, kelda: Vørn

Skip	Sýslunr.	Kalli-bókstavir	Veiðinøgd tilsamans kg	Veiðivirði tilsamans, kr	Brúktir fiskidagar	Veiðivirði pr. dag, kr
VESTURHAVIÐ	VN0700	OW2009	146.403	4.465.869	15,94	280.167
KLAKKUR	KG0009	OW2046	97.290	3.214.039	8,53	376.792
JÓGVAN I	FD0710	OW2049	128.127	4.546.789	15,98	284.530
STAPIN	FD0032	OW2065	146.750	4.518.069	15,98	282.733
KAMBUR	FD0454	OW2115	45.509	1.447.970	15,98	90.611
PISON	KG0476	OW2132	129.396	3.831.780	16,00	239.486
POLARSTJØRNAN	KG0349	OW2319	102.138	3.274.773	15,92	205.702
KVIKK	KG0477	OW2426	37.263	819.495	8,11	101.047
JÁKUP B	KG0007	XPPR	32.200	1.140.862	7,96	143.324
EIVIND	VA0132	XPQE	139.303	3.910.698	24,04	162.675
SANDSHAVIÐ	SA0499	XPRK	45.082	1.385.974	7,96	174.117
NÚPUR	KG0910	XPZB	152.734	3.135.950	15,46	202.843
Samantalt			**1.202.195**	**35.692.267**	**167,86**	**212.631**

TALVA 2 : Veiða á Føroyabanka 2022 – útróðrarbátar 15-110 tons í bólki 4, kelda: Vørn

Skip	Sýslunr.	Kalli-bókstavir	Veiðinøgd tilsamans kg	Veiðivirði tilsamans, kr	Brúktir fiskidagar	Veiðivirði pr. dag, kr
KALLANES	FD0590	OW2027	29.472	702.767	7,66	91.745,07
BRANDUR	KG0557	OW2198	41.637	925.043	7,90	117.094,03
BRAGD	KG0642	OW2262	32.981	789.773	8,67	91.092,65
VOLUNTEER	FD0387	OW2279	137.414	3.092.756	19,97	154.870,13
FISKIVARÐI	VN0659	OW2366	210.570	4.620.309	35,56	129.929,95
ANRU	KG0730	XPSI	354.980	8.476.581	62,65	135.300,57
LÍÐHAMAR	KG0602	XPTR	33.645	744.386	7,99	93.164,74
NORÐSØKI	KG0538	XPUF	60.996	1.378.414	12,54	109.921,39
Samantalt			**901.695**	**20.730.030**	**162,94**	**127.225**

TALVA 3 : Veiða á Føroyabanka 2022 – útróðrarbátar undir 15 tons í bólki 5, kelda: Vørn

Skip	Sýslunr.	Kalli-bókstavir	Veiðinøgd tilsamans kg	Veiðivirði tilsamans, kr	Brúktir fiskidagar	Veiðivirði pr. dag, kr
STAKKAVÍK	KG0748	OW2095	11.683	276.765	3	92.255
GORDRÚGVIN	FD0359	OW2114	19.297	455.852	5	91.170
KONGAVARÐI	TN0366	OW2131	3.094	63.311	1	63.311
FALKURIN	FD0660	OW2482	21.099	517.172	3	172.391
DALSENNI	KG0301	XPF2196	8.657	192.654	3	64.218
PETUR M.	TG0552	XPSY	1.700	40.160	1	40.160
FAGRAENNI	KG0398	XPUP	14.905	325.314	3	108.438
ELIN JÓHANNA	FD0263	XPWH	16.611	397.475	4	99.369
ANNA MARIA	VA0369	XPWJ	2.236	47.223	1	47.223
LÍRABERG	TN0213	XPXU	19.730	438.412	3	146.137
LILJA	VA0072	XPYR	2.934	62.225	1	62.225
TRØSTUR	FD0094	XPZM	8.115	191.804	2	95.902
Samatalt			**130.061**	**3.008.365**	**30**	**100.279**

Eg kann leggja afturat, at skipanin á Føroyabanka í 2022 verður eftirmett, áðrenn endalig støða verður tikin til, hvat verður gjørt í 2023.

Dennis Holm
landsstýrismaður